LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 019/2024 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Bárði á Steig Nielsen, løgtingsmanni, um ríkisveitingina

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Ætlar løgmaður at halda fast við at skerja ríkisveitingina, hóast búskaparstøðan er munandi broytt?

Svar:

Í samgongusemjuni frá desember 2022 vórðu Javnaðarflokkurin, Tjóðveldi og Framsókn samd um eina lagaliga lækking av ríkisveitingini við 25 milliónum árliga. Tó fekk Javnaðarflokkurin tað fyrivarni við, at:

"Um búskaparliga støðan broytist, og vøksturin verður negativur, verður ætlanin endurskoðað."

Tað er rætt, sum spyrjarin nevnir, at Búskaparráðið í síni seinastu frágreiðing væntar eina minking av búskaparvøkstrinum í 2025, so tey vænta ein vøkstur á 3,3 %. Men talan er ikki um negativan búskaparvøkstur.

Neyðugt er at taka ávís fyrivarni fyri metingarnar, tí stór óvissa er um metingarnar um búskapargongdina fram í tíð. Til dømis metti Búskaparráðið í sínari várfrágreiðing fyrr í ár, at vøksturin bert fór at verða 2,8% í 2025. Tískil hevur Búskaparráðið hækkað metingina í seinastu frágreiðing við einum hálvum prosentstigi.

Við einum mettum búskaparvøkstri á 3,3 %, sum liggur langt frá einum negativum búskaparvøkstri, er ikki grundarlag fyri at endurskoða ætlanina um at skerja ríkisveitingina, men um støðan broytist og búskaparvøksturin verður negativur, verður ætlanin um ríkisveitingina endurskoðað.

Í Tinganesi, 16. september 2024

Aksel V. Johannesen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo